# Blikur í stórum stíli

**Hjá 5 mannaførum við gentum var ongin ivi um, hvør fór fyrstur um málið. Tvær bátslongdir framman fyri hinar vann Blikur**

5 mannafør gentur
Solby A. Eliasen
solby@sosialurin.fo



Frá tí at skotið brast løgdu genturnar á Bliki seg á odda. Drekin í hølunum á teimum og síðani Tjaldrið og Tekla. Blika genturnar vóru ísakaldar allan róðurin og øktu um munin allan vegin inn á mál. Tá skotið inni á málinum brast, vóru tær tvær bátslongdir framman fyri hinar bátarnar. Síðani kom Drekin og teimum á baki Tekla.

### 5 mannafør gentur

1 Blikur 05:32.04
2 Drekin 05:36.05 1G
3 Tekla 05:40.19
4 Tjaldrið 05:42.05
5 Erla Kongsdóttir 06:11.14



**Rósa Maria Johannesen rør við Bliki, gentum og situr í rúminum bakborð:**

## Vit gera okkara besta

Blikur við gentum fekk eina sera keðiliga byrjan á norðoyastevnu, tá tær hingu fastar í startinum og endaðu aftastar. Keðiliga byrjanin hevði tó ikki stóra ávirkan á manningina, tí síðani hevur Blikur vunnið, og kósin í móti føroyameistaraheitinum tykist at vera sett.

- Vit høvdu ongan varhuga av, at vit fóru at klára okkum so væl í ár undan kappingini, men vit gera okkara besta, sigur toftigentan á reyða bátinum av Argjum.

Manningin á Bliki luttók í barnaróðrinum í fjør og fyrraárið, men onkur útskifting hevur til kappingina í ár.

- Vit hava góðar vónir um at vinna føroyameistaraheitið í ár, tí tað gongur so væl, viðgongur Rósa Maria brosandi.

Genturnar á Bliki eru einasta manningin úr Argja Róðrarfelag, sum í ár kann vinna eitt føroyameistaraheiti. Í fjør vann sama róðrarfelag heili trý FM-heiti.

**- sae -**



**Annelisa Justesen rør við Fípuni Føgru og situr á toftini í bakborð:**

## Fyrsta gullmerkið í kappróðri

Fyrr í vikuni gav Annelisa Justesen avboð til oyggjaleikalandsliðið í fótbólti, tí hon skuldi rógva á Fjarðastevnu. Føroyska liðið er mett at vera favorittur til gullkrónurnar í Hetlandi, men eftir róðurin hjá 5 mannaførum við kvinnum var Annelisa glað fyri avgerð sína.

- Eg var við á Oyggjaleikunum seinast, og tá vunnu vit gull. Eg havi ongantíð vunnið gull í kappróðri fyrr, so eg eri sera glað fyri mína avgerð, greiðir Annelisa glað frá.

Sigurin hjá Fípuni Føgru var eitt av teimum heilt óvæntaðu úrslitunum á Skála leygardagin. Á Varmakeldu endaði Fípan Fagra á fimta plássið, so framgongdin hjá teimum má sigast at vera sera stór. Annelisa var ikki við á Varmakeldu.

- Eg spældi við KÍ í steypafinaluni, so eg fekk ikki róð við tá, men so helt eg aftaná, at eg skyldaði mínari manning at vera við restina av árinum, so tí gjørdi eg av at senda avboð til landsliðið, sigur Annelisa.

*Hvør er orsøkin til stóra framstigið hjá tykkum?*

- Tað eru fleiri manningar, sum gera stór framstig frá einari stevnu til aðra, so hví skal tað ikki bera til hjá okkum eisini? Hartil eru vit í sera góðari venjing í ár. Bæði í fjør og í ár hava vit ligið har frammi, tá fleiri bátar eru farnir nærum samstundis um málið, og hvørjaferð endaðu vit sum ein av teimum aftaru. Men ikki í dag, staðfestir Annelisa Justesen.

**- sae -**